# Kunngerð

Torført er at fáa byggilán, og eru hesi eisini dýr og ógvuliga stuttfreistaði (5-10 ár), og muna tey sostatt lítið.

Sjálvt við lagaligum lánum frá 60 mill.-grunninum til Sundsverkið hevur ikki eydnast okkum at sjálvfíggjað meira enn sløk 10% av bygging elfelagsins hesi seinastu 5 árini, restin er lánifíggjan.

Umframt teir høgu oljuprísirnar er atvoldin, at streymurin til virkir og ídnað verður latin undir kostnaðarprís, og er streymveitingin til hesar nýtarar í seinastuni vaksin nógv meira enn til vanlig húsarhald.

Hetta ber sjálvsagt ikki til, og hevur umboðsnevndin tí tikið ta prinsipiellu støðu, at eingin streymur má latast undir meðalkostnaðarprís í viðkomandi fíggjarári.

Eisini er samtykt, at tað núgaldandi felagsgjald fyri húsarhald o. a. skal fevna um allar elnýtararnar við hesi tillaging:

1. Bólkarnir við ársnýtslu 0-500, 500-5.000 og 5.000-10.000 verða lagdir saman í ein bólk: 0-10.000 kWh/ár.
2. Bólkarnir 10.000-15.000 og yvir 15.000 koma undir ein víðkaðan bólk: 10.000-100.000 kWh/ár.
3. Aftrat kemur so ein bólkur: yvir 100.000 kWh/ár.
4. Tey føstu gjøldini verða harnæst tillagaði soleiðis, at gjaldið tilsamans samsvarar ársnýtsluni.

   Nevnt kann verða, at í ár verður at kalla eingin broyting av húsarhaldsgjaldinum.

Í ár hava vit mett meðalkostnaðin við málarin til 38 oyru/kWh, og skal streymurin gjaldast eftir hesari

**Gjaldsskrá frá 1. juli 1977**

| Ársnýtsla | Streymgjald | Fast gjald |
|---|---|---|
| 0 - 10.000 kWh | 48 oyru/kWh | 180 kr./ár |
| 10.000 - 100.000 „ | 40 „ | 980 „ |
| yvir 100.000 „ | 38 „ | 2.980 „ |

Í kunngerð um gjaldsskrá frá 1. august 1976 var nevnt, at ársuppgerðin skuldi leggjast aftrat ella dragast frá avgjøldunum í komandi ári.

Hetta hava vit ikki klárað í ár; men vónandi verður skipanin sett í verk næsta ár.

S. E. V.